OL í Istanbul

Føroyingar hava fingi› eina sera gó›a byrjan í OL. John Rødgaard vann ímóti sterkum kjekkiskum stórmeistara í fyrsta umfari, og í ø›rum umfari góvu vit tunesisku telvarnum ongan møguleika

TALVOLYMPIADA
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Føroyingar møttu Kjekkum í fyrsta umfari í talvolympiaduni í Istanbul, sum byrja›i leygardagin. Útlitini vór›u ikki tey bestu, tí kjekkisku telvarnir høvdu allir umlei› 2500 í rating og vór›u tí væl omanfyri føroysku telvarnir. Men føroyingarnir bardust manniliga og fingu eitt hei›urligt úrslit til hølvdar. Úsliti› bleiv 3-1 til Kekkia. John Rødgaard framdi megnarbragd vi› at vinna ímóti kjekkiskum stórmeistara á ø›rum bor›i. Sera flott og t‡dningarmiki› fyri føroyska li›i».

Hølva›u Tunesia av í 2. umfari

Í ø›rum umfari sum bleiv telva› sunnudagin, var› Tunesia mótstø›uli› okkara. Tunesia er beint ni›anfyri Føroyar tá seeding vi›víkur, og útlitini í hesum dysti vór›u tí heldur frægari. Føroyingarnir gjørdu sanniliga bart í hesum dysti, teir vunnu nevnliga heili 3-1 og hava eftir tveimum umførum nú ogna› sær f‡ra stig.

John Arni Nilssen telva›i hegnisliga javnt ímóti einum stórmeistara, me›an John Rødgaard enn einafer› vann, hesafer› ímóti einum altjó›a meistara. Heini Olsen leikti javnleik og Flóvin vann á fjór›a bor›i, og sostatt enda›i dysturin 3-1 til Føroyar.

Ein ómetaliga gó› byrjan, og vónandi gevur hetta nógv sjálvsálit til okkara telvarar. Fjúrtan dystir skulu føroyingar og øll hini li›ini telva.

Í gjár telva›u føroyingar tri›ja umfar har Ólavur Simonsen avloysti Heina Olsen, men vegna deadline fingu vit ikki úrsliti› vi› í bla›i› í dag.

Úr Turkalandi frættist ta› frá føroyingum, at teir allir hava ta› gott og at ve›ri› er passaliga heitt, og ávirkar tí ikki talvi›.

OL er at finna á www.istanbulchessolympiad.com.

Tá teknikkurin svíkur

Ikki altí› er ta›, at teldurnar vilja ta› sama sum vit, og heta mugu ítróttalesarannir kenna svian av í dag

TEKNISKIR TRUPULLEIKAR
Jákup Mørk

Sum lesarin kanska hevur lagt til merkis, so er innihaldi› av dagsins Ítrótta-Sosialinum ikki ta› sama, sum vanligt er í t‡sdagsbla›num okkara.

Hetta kemst tó ikki á nakran hátt av, at vit hava nakrar sum helst ætlanir um at minka um innihaldi av ítrótti í bla›num.

Tvørturímóti var til bla›i› í dag skriva› hópin av tilfari, fevnandi um fleiri ítróttagreinar.

Av einhvørjari orsøk, er meginparturin av hesum greinum antin sletta›ar ella oy›ilagdar, og hóast vit mánamorgunin fingu hjálp frá serkønum fólki, so stó› tilfari› ikki til at bjarga.

Einasta, sum vit her á bla›num fáa gjørt, er at bi›ja lesaran um eina umbering, og samstundis kunnu vit vissa um, at vit her á bla›num leggja orku í, at slík fyribrigdi ikki endurtaka seg.

Úrslit, 1. deild kvinnur

Kyndil-Sóljan 25-24
Neistin-Tjaldur 26-17
Kyndil-Stjørnan 22-32
VB-Sóljan 32-21

Stø›an 1. Deild kvinnur

		d	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Stjørnan	5	4	-	1	-	0	136	116	20	9
2	VÍF	4	3	-	1	-	0	116	55	61	7
3	Kyndil	5	3	-	0	-	2	123	130	-7	6
4	VB	3	2	-	0	-	1	94	60	34	4
5	Neistin	4	2	-	0	-	2	94	86	8	4
6	Sóljan	6	1	-	0	-	5	127	157	-30	2
7	Tjaldur	5	0	-	0	-	5	73	159	-86	0

Úrslit, 1. deild, menn

Neistin-Tjaldur 25-15
Kyndil-StÍF 27-27
KÍF-H71 24-27

Stø›an 1. Deild menn

		d	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VÍF	5	5	-	0	-	0	163	116	47	10
2	StÍF	6	4	-	1	-	1	181	139	42	9
3	Neistin	5	3	-	0	-	2	124	114	10	6
4	H71	5	3	-	0	-	2	138	139	-1	6
5	Kyndil	5	1	-	2	-	2	138	132	6	4
6	KÍF	5	0	-	1	-	4	113	132	-19	1
7	Tjaldur	5	0	-	0	-	5	99	184	-85	0

VI‹MERKINGAR

Ein heilsan

Signar á Brúnni,
løgtingsma›ur

Nú avger›in er tikin um, at navnframi listarma›urin Ingálvur av Reyni fær mentanarvir›islønina í ár 2000, eru ta› mong, i› fegnast. Teirra millum undirrita›i, sum heilt frá ungum árum av, var hugtikin av tí, sum Ingálvur skapti á listarliga økinum. Bl‡antstekningar hansara vóru eftir mínum tykki í serflokki.

Tá eg frætti, at Ingálvur av Reyni, skuldu fáa vir›islønina í ár, rann mær í huga, at eg á ungum árum hev›i veri› so framligur at ummælt bókina »Tekningar og skitsur« – men sætt at siga fekk eg stóra og gó›a løn fyri at skriva ummæli› – eitt eintak av bókini – i› enn ver›ur goymd sum rey›argull. Søgan var henda: Eg var av bla›num Sosialinum bi›in um at skriva ummæli, teir, i› har starva›ust, høvdu frætt, at eg hev›i stóran áhuga fyri list – og ikki minst fyri tí, i› Ingálvur skapti.

Ótrúliga ósmæ›i› av mær, at ditta mær til tílíkt, slíkt áttu a›rir, i› hvdøu størri innlit enn eg at gjørt. Men gjørd ger› fær onga vend, eg seg›i beint fram ta›, i› mær dámdi – og ta› var alt. Tá i› listarma›urin harumframt er lítillátin og positivur og samstundis hevur veri› ein sló›brótari innan føroyska list, so eigur hann alt rós og hei›ur uppibori›. Ein stoltleiki fyri okkara land.

»Í hesi viku kemur ein n‡ggj – eftir okkara vi›urskiftum – sjáldsom bók í bókabú›irnar. Hon er útgivin av Ingolvi av Reyni, og ber heiti›: »Skitsur og tekningar« sum eru frá 10 teimum sí›stu arbei›unum. Inngangurin er eftir William Heinesen. Maud Heinesen hevur umsett til enskt og Magnus Dam Jacobsen til føroyslt. – Bókin er prenta› í 500 talmerktum eintøkum og ver›ur ikki endurprenta›. Tilrættalegging og prent: Estra, Gøtu.

Í innganginum ver›ur fyrst sagt naka› um málningalistina her á landi. – Ikki fyrrenn í tríatiárunum kom rættilig gongd á, S. Joensen Mikines at takka, og sí›an hevur føroysk málningalist tiki› seg fram vi› risastigum. Sí›an ver›ur listarma›urin – Ingolvur av Reyni, nevndur – hin sermerkti og ein av okkara fremstu listarmonnum.

Ingolvur av Reyni er føddur í Tórshavn 1920 eg var næmingur á kunstakademiinum í Keypmannahavn í árunum 1943-46. Hann hevur havt nógvar málningaframs‡ningar í Havn, á Kunstnernes Efterårsudstilling, Charlottenborg, á teirri føroysku listaframs‡ningini í Keypmannahavn og Århus 1956 og í Reykjavík 1961.

Hann hevur gjørt nógvar kanningarfer›ir í útlondum einamest í Frankaríki og her er hann sum so nógvir a›rir kunstnarar í okkara tí› – ávirka›ur av tí stóru uppgongd sum var í franskari málningalist um aldarmóti, serstakliga Cezanne og Brague, i› bá›ir ver›a rokna›ir millum teir stóru kunstnarnar. Eisini a›rir listarmenn hava havt t‡dning fyri Ingolv av Reyni, t. d. kunnu vit nevna Immanuel Ipsen.

Ingolvur av Reyni hevur ein serligan stíl, hann gongur sínar egnu lei›ir, tær eru fyri honum natúrligar. Hann skapar ta› ikki solei›is og solei›is tá a›rir gera ta›, – nei ta› er hansara lyndi i› noy›ir hann. Eins og Mikines kann hann ver›a taldur millum teir religiøsu málarnar. – Ta›, i› hann avmyndar, er ofta einfalt og gerandisligt – myndir úr Havnini og ø›rum plássum í landinum, figur- og andlits myndir eiga tokka hansara.

Inngangurin er, sum á›ur sagt, skriva›ur á føroyskum, donskum og enskum.

Henda bók ver›ur óiva› keypt av fleiri útlendingum, sum samstundis fáa at vita naka› um málningalist her á landi› – og somulei›is um henda listarmann, á teirra egna máli. Men enn

meira fær vi›komandi i› hevur ogna› sær bókina, at vita um listarmannin vi› at bla›a hana ígjøgnum. Myndirnar, ikki minni enn 58 í tali›, eru óiva› sær bestu Ingolvur av Reyni hevur gjørt. Tær eru tekna›ar vi› bl‡anti, tushi og blákriti. Ein mynd t.d. kallar hann: gamlir menn í Vágsbotni. Hetta er ein einfald og gerandislig mynd. – Her eru gamlir menn sampla›ir – menn sum nú eru givnir at arbei›a – givnir vi› at fara út á flot. – Ista›in samlast teir her ni›ri vi› sjógvin, her er ein serligur hugni fyri teir at standa. Teir tosa um gamlar dagar – sammeta nútí›ina vi› tátí›ina o.s.fr. Bert vi› nøkrum strikum vi› tushpenninum fær listarma›urin hesa mynd at virka livandi – meira tú hyggur at henni, enn betur ver›ur hon, og enn meiri sigur hon tær. – Líknandi mynd er longur úti í bókini. Her standa eldri menn undir neystinum saman vi› yngri monnum, i› ætla út á flot. Tosa› ver›ur um ve›ri› – og her er ta› teir gomlu, i› ver›a spurdir – tá teir ikki kunna sjálvir fiska – so kunnu teir geva teim yngru veglei›ing. – Hesar tushmyndir ver›a tiknar fram – tí hetta eru tey typisku motivini hjá Ingolvi av Reyni. Ta› ein kundi skriva um í rúgvuvís; kann Ingolvur av Reyni siga vi› eini tekning. Enn betur, vísir hetta okkum, tá vit hyggja at teim nógvu andlitsmyndunum í hesi bók. – Vakrar vi› bl‡anti, a›rar vi› tushi og einkultar vi› blákriti. Allar gó›ar – pennurin ver›ur ikki tikin upp av arkinum, men skapar stø›ugt naka› – og at enda fáa vit eitt andlit – livandi. Vit síggja hitt sorgarbundna andliti› – hitt hugsunnarsama – ta› gó›a – o. s. fr. Bl‡antstekningarnar eru frálíka gó›ar. Serliga bítur ein merki í tekningina av trimum eldri monnum.

Somulei›is eru fleiri myndir av ymiskum kendum persónum. Eitt nú av Long og Hans á Lag og enn betur myndin av P. M. Dam løgmanni.

Umframt tær nógvu myndirnar av fólki, eru eisini frálíkar myndir av b‡arpørtum í Havn. Gomul hús i› standa millum teir n‡ggju hygningarnar, skip, menn í arbei›i, úr løgtinginum o.s.fr.

Hetta er ein vir›ismikil bók – ein bók vi› 58 lista-rverkum – sum einhvør eigur at ogna sær. Samstundi skemur útgávan av hesi bók, at ver›a tí føroysku málningalistini ein stórur stu›ul.«

S. H.



Fólkaflokslátri› tømist og brimlarnir brøla

Ólavur í Beiti
rithøvundur

Mær kemur fyri, at seinasta útspæl frá landsst‡rinum í samrá›ingunum vi› danir, hevur sera nógv at gera vi› filosofiina hjá Zakarias Wang, at Føroyar eru ikki í danska ríkinum. Eg hugsi hetta er í høvu›sheitinum ta›, sum sakarmáli› í Haag hjá Zakarias Wang sn‡tgjógv.

Føroyar fara til samrá›ingar á jønvnum stø›i vi› Danmark, sum tveir suveænir statir, tí Føroyar eru ikki í danska ríkinum. Sambært Bergen sáttmálanum hjá Zakariasi Wang, hugsi eg ta› er.

Og ta› er einki at siga um, at hetta er samrá›ingaruppleggi› hjá landsst‡rinum, tá i› júst Zakarias Wang og Kjartan Hoydal eru meinings smi›irnir hjá fullveldisbarninum í hesum landsst‡rinum, nevniliga Høgna Hoydal, sjálvst‡rismálará›harra. Eg trúgvi, ta› er sera torført at sannføra fleirtali› í Fólkaflokkinum um, at talan er um at fáa Føroyum fullveldi, tí sum frálí›ur er sera greitt komi› fram, at talan er heldur um misnøgd og maktsjúku enn um at fáa føroyingum frælsi og ábyrgd.

Hetta er sjálv muran í samrá›ingunum nú, tí ver›a snildir og kenslur brúktar í samrá›ingunum, sum júst er speciali hjá Óla Breckmann.

Henda ambivalenta stø›an, at tú fyrst sigur um seinasta val, at ta› var ein tjó›veldis psykosa, og so naka› eftir sjálvur gerst bergtikin av hesi somu psykosu, tí har eru atkvø›ur at fáa, heldur enn úrslit! Forma›urin í Fólkaflokkinum hugsar ikki um anna› enn atkvø›ur, og snildir og kenslur eru jú fremsta mi›il til tess, ikki sannheit?!

Hugsa bert eina lítla løtu um seinasta útspæl hjá Fólkaflokkinum vi› uppskotindum um skattalætta, so skilja øll á hvørjum stø›i Fólkaflokkurin arbei›ir nú. Og ikki tí at hetta ikki hev›i veri› eitt munagott uppskot, men ætlanin vi› uppskotinum var eingin onnur enn at framelva eina psykosu millum atkvø›urnar hjá Fólkaflokkinum. Eina »sunnheits-psykosu« kundu vit kanska nevnt hana!

Fólkaflokkurin hevur nú tey seinastu árini tillaga seg til ba›i eitt skifti í identiteti og eisini innihaldi og muru. Ongantí› á›ur í søguni hevur muran í flokkinum veri›, sum hon er í dag, og eg gevi tveimum grundum skyldina fyri tí:

Onnur er fullveldisætlanin og hin at flokkurin hevur fingi› Óla Breckmann til formann!

Ta› kunnu ikki vera meiri syndarligar stø›ur at koma í hjá einum annars skilagó›um flokki, at veljarin kemur í tvístø›u! Hetta er júst ta› sum er hent seinastu árini, at flokkurin hevur mist sín identitet og hevur fingi› n‡ggja muru!

Trupulleikin hjá Fólkaflokkinum er tí nú, at hann hevur brent seg so dyggiliga, at hann er fullkomiliga stø›ga›ur upp og bara brimlarnir í flokkinum hoyrast, me›an látri› bara tømist og tømist!

Einasti útvegur er tí at bjarga tí i› fæst bjargast, á›renn ov seint er!

Fólkaflokkurin hevur havt stórt álit á løgmanni, og eg havi einki anna› hoyrt bæ›i frá høgum og lágum í flokkinum bæ›i privat og alment at »Anfinn Kallsberg kemur heim vi› eini gó›ari avtalu!« Og so er komi› aftrat: »Ta› skal eg siga tær!«

Men Anfinn Kallsberg kemur ongantí› heim vi› nakrari gó›ari avtalu, tá i› hann ikki fyri ta› fyrsta hevur flokkin aftan fyri seg, og tá i› hann í ø›rum lagi hevur vent sær frá Fólkaflokkinum og móti Zakariasi Wang og Kjartani Hoydal!

Hetta stendur so púra rimmar fast!